







# Stuðulskonsert í Mentanarhúsinum

**Annika Hoydal, Kári P, Martin Joensen, Kári Sverrison, Makrel, 200, Kristleif Zachariasen, Knút Háberg Eysturstein og Showmenn vera millum nøvnini, ið fara at framføra á stóru stuðulskonsertini í Mentanarhúsinum leygardagin 29 januar. Peningurin, ið kemur inn frá tiltakinum, fer til tey, ið vóru rakt av flóðalduni í Asia 2. jóladag**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Kári Sverrisson og Óli Olsen. Teir verða við á konsertini í Fuglafirði leygardagin og tann 4. februar eru teir á palli í Rex*

Leygardagin verður stórt tónleikatiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað eru Plátufelagið Tutl og Mentanarhúsið, ið skipað fyri tiltakinum í felag. Talan er um eina bæði stóra og fjølbroytta skrá, ið fevnir um eitt breitt úrval av bólkum og einstaklingum, ið hava givið út fløgur á plátufelagnum Tutl seinastu árini. Byrja verður kl 15 við barnakonsert og so heldur tónleikurin fram út á náttina, tó við tveimum steðgum á hálvan tíma hvør. So-statt verður tiltakið nærum sum ein eindags festivalur við barnakonsert, jazz framførslum, fólkatónleiki, singer/songwriter, rock konsert og dansi.

Hetta verður eitt frálíkt høvi hjá øllum aldursbólkum at hoyra dygdargóðan føroyskan tónleik á einari konsert, og samstundis stuðla einum góðum endamáli.

Kostnaðurin fyri atgongumerki verður 200 kr fyri allan dagin. Børn undir 12 ár sleppa inn fyri 50 kr. Eftir kl 01:00 tá dansurin byrjar verður kostnaðurin fyri atgongumerki 120 kr.

## Showcase

Knút Háberg Eysturstein er samskipari av tiltakinum. Hann sigur, at upprunin til tilktakið er, at í november tosaðu fólk frá Tutl og Mentanarhúsinum saman. Ætlanin var at gera eina sonevnda showcase - eina konsert, ið skuldi vísa nakað av tí, sum Tutl hevur givið út. Dentur skuldi leggjast á aktuell nøvn í stóran mun.

Men 2. jóladag komu tíðindini um flóðalduna í Asia og so var jú upplagt at skipa tiltakið sum eina stuðulskonsert.

- At fáa tónleikarar at stuðla hevur ikki verið ein trupulleiki og hinvegin er hetta eisini ein møguleiki hjá teimum at gera vart við seg, sigur Knút H. Eysturstein, ið metir, at tiltakið í stóran mun er skipað sum ein heildaruppliving og eigur at njóstast sambært hesum.

- Tutl hevur verið virkið útgávufelag síðani 1977, men tó eru tað kanska ikki øll sum vita, hvat Tutl er og stendur fyri. Kanska serliga tey yngru vita lítið um felagið, hóast tey kanska kenna útgávur, sum felagið hevur staðið fyri. Tí er rímuligt at gera vart við felagið, sigur Knút Háberg Eysturstein.

**Skrá:**

Kl. 15:00 Sóljudansir (barnakonsert, tónleikur og sangur til yrkingar eftir Alexander Kristiansen)
Kl. 16:00 Mari Mons (finsk songkvinna, spælir frumkendan fólkatónleik)
Kl. 16:45 Yggdrasil (folk/ jazz)
Kl. 17:30 Brandur Jacobsen v/ bólki (folk/jazz)
steðgur hálvan tíma
Kl. 18:30 Kristleif Zachariasen (singer/songwriter)
Kl. 19:15 Knút H. Eysturstein v/ bólki (singer/songwriter)
Kl. 20:00 Kári Sverrison (folk/jazz)
Kl. 21:00 Martin Joensen v/ bólki (folk)
steðgur hálvan tíma
Kl. 22:00 Makrel (rock)
Kl. 23:30 200 (punk)
Kl. 01:15 Showmenn (dansur)




